UTTAN ÚR HEIMI

# Hann kann fáa Evropa at skelva

**Í Bretlandi hóttir tann konservativi flokkurin nú við at vraka ta ætlaðu ES-grundlógina, vinnur hann valið í næsta mánað. Tað kann fáa álvarssamar avleiðingar**

VALSTRÍÐ

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ber tað til at ímynda sær eitt ES uttan Bretland? Tað heldur í hvussu er formaðurin í bretska konservativa flokkinum, Michael Howard, og hann hevur av álvara drigið tann spurningin upp í valstríðið upp undir parlamentsvalið tann 5. mai.

– Vit eru ímóti ES-grundlógini, og fáa vit valdið aftan á valið, fara vit at lata veljararnar taka støðu til lógina innan seks mánaðir eftir stjórnarskiftið, stendur í valskránni, sum teir konservativu løgdu fram mánadagin.

Reglurnar siga, at øll tey 25 limalondini í ES skulu góðkenna grundlógina, skal hon koma í gildi. Diplomatar í Bruxelles og London dylja ikki fyri, at vraka bretar grundlógina, kemur lagnan hjá samveldinum at liggja í hondunum á einum flokki, sum tey seinastu árini hevur hert sína mótstøðu ímóti samveldinum.



*Michael Howard hóttir nú við at lata bretar fella ES-grundlógina. Tað fer at raka ES sum ein jarðskjálvti*

*Mynd: Reuters*

Diplomatarnir siga, at ES noyðist at taka hóttanina frá teimum konservatiovu í størsta álvara, og teir eru á einum máli um, at eitt bretskt nei til grundlógina fer at raka ES sum ein jarðskjálvti. Kortini ugga teir seg við, at tað er ikki altíð, at samsvar er ímillum valskránna hjá einum flokki og tann politikk, sum flokkurin rekur, tá hann fær valdið.

Samstundis vísa veljarakanningar, at Labour og Tony Blair, forsætisráðharri, noyðast at taka teir konservativu í álvara hesaferð. Munurin á flokkurin er ikki stórur, og tann stóri andstøðuflokkurin er sjónliga farin í álop, skrivar NTB. Spurningurin um ES er eitt væl valt evni, tí nógvir bretskir veljarar eru sera ivingarsamir um at lata Bruxelles ov nógv vald.

Tann stóri spurningurin í valstríðnum hevur annars verið eitt lyfti hjá teimum konservativu um lægri skatt. Tony Blair, forsætisráðharri, hevur ávarað veljararnar ímóti lyftinum, og Gordon Brown, fíggjarmálaráðharri, segði mánadagin, at ein atkvøða fyri teimum konservativu er ein hóttan ímóti bretsku vælferðini.

## Missa nógv arbeiðspláss

Í Svøríki ens og í øðrum londum ætla politikararnir at leggja stóran dent á gransking fyri at útvega nýggj arbeiðspláss, nú alheimsgeringin ger, at nógv arbeiðspláss verða flutt við láglønarlond kring heimin.

Men gransking fer ikki at loysa trupulleikarnar í Svøríki, sigur Magnus Kamsund, sum er fyrrverandi stjórin í fyritøkuni Ericsson. Við blaðið Dagens Næringsliv sigur hann, at tað er púra burturvið av svium at halda, at tað er nóg mikið at granska og menna, tó tað er ikki nóg mikið til at forða ávirkanini, sum kemur uttaneftir.

Í svenska vinnulívsfelagnum vænta tey, at umleið 350.000 arbeiðspláss fara av landinum tey næstu fimm árini, og at í sama tíðarskeiði koma bara 3.600 nýggj arbeiðspláss í Svøríki. Serfrøðingar vísa á, at í seksti- og sjeytiárunum mistu sviar nógv arbeiðspláss í klædnaídnaðinum av landinum. Tá bar til at útvega nýggj arbeiðspláss ístaðin fyri, men tað gongur ikki hesaferð, siga teir. Sambært hagtølunum eru 119.000 arbeiðspláss horvin í Svøríki tey seinastu fimm árini.

## Loyst gamalt loyndarmál

Norski verkfrøðingurin Frode Weierud og bretski starvsbróður hansara, Geoffrey Sullivan, hava seinastu árini avdúka fleiri loynilig boð hjá týska herinum undir seinna heimsbardaga. Í hesum arbeiði hava teir avdúkað ymiskt, sum eingin visti um frammanundan.

Sunnudagin visti bretska blaðið Sunday Times at siga, at teir báðir verkfrøðingarnir hava loyst eitt loyndarmál afturat. Hesaferð snýr tað seg um morðroyndina ímóti Adolf Hitler tann 20. juli í 1944. Hitler slapp livandi frá morðroyndini, og hann gav alt fyri eitt sínum næstu monnum boð um at hevna atsóknina. Í hesum sambandi hevur ivi verið um, hvørt generalurin Friedrich von Rebenau bleiv avrættaður fyri at hava verið uppi í morðroyndini, men nú hava teir báðir verkfrøðingarnir avdúkað, at generalurin bleiv skotin eftir boðum frá ovastu týsku leiðsluni.

Frode Weierud og Geoffrey Sulliavn siga, at Gestapo-ovastin Heinrich Múller fekk boðini um, at von Ramleben var avrættaður. Tá kríggið endaði, var Heinrich Múller ikki at finna. Eitt eygnavitni vildi vera við, at hann flýddi við einum kavbáti til Argentina, men tað er ongantíð prógvað.

## Dýrar brillur

Ein bretsk kanning vísir, at tað er dýrari at keypa brillur í Damark enn í nøkrum øðrum landi í Evropa. Yvirhøvur vísir kanningin, at brillur eru dýrar í Norðurlondum, tí Noreg, Svøríki og Finnland eru ávikavist nummar tvey, fýra og fimm í yvirlitinum.

Úrslitið av bretsku kanningini kemur ikki óvart á danir. Í 2002 vísti ein kanning hjá kappingarráðnum, at tað var ov dýrt at keypa brillur í Danmark, og at kappingin ímillum brilluhandlarnar var alt ov lítil. Nú tann bretska kanningin staðfestir, at støðan er tann sama í dag, ætlar kappingarráðið at taka málið uppaftur.

Í einari spurnarkanning í sjónvarpinum mánakvøldið kom fram, at danir halda tað vera alt ov dýrt at keypa sær brillur. Samstundis bleiv víst á, at tað loysir seg væl at fara suður um týska markið at keypa brillur, tí tær eru væl bíligari har. Í prísyvirlitinum í bretsku kanningini liggur Týskland á níggjunda plássi.

# Nú skal pólísurin kannast

**Vísindafólk skulu nú kanna, hví ísurin við teir báðar pólarnar minkar skjótari nú enn nakrantíð fyrr**

UMHVØRVI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanskir, bretskir og danskir granskarar fara nú at kanna, hvussu tað ber til, at ísurin í teimum báðum póløkjunum er minkaður so nógv tey seinnu árini. Endamálið við kanningunum er at fáa eina betri fatan av teimum heimsumfatandi veðurlagsbroytingunum, hvussu broytingarnar í póløkjunum ávirka heimshøvini, og hvørjar avleiðingar hesar broytingarnar kunnu fáa á búskapin og onnur viðurskifti í heiminum.

- Tað er neyðugt at fáa at vita, hvat er í ferð við at henda í póløkjunum, tí tað ávirkarveðurlagið, høvini og heimsins matvørutilfeingi, sigur amerikanski vísindamaðurin Robert Hemenway, sum skal standa á odda fyri kanningunum í póløkjunum.

Í fjør komu granskarar hjá amerikonsku rúmdarumsitingini NASA eftir, at ísurin á Antarktis minkar skjótari nú enn nakrantíð í síðstu øld. Fyrr í hesum mánaðinum loysnaði heimsins størsta ísfjall, eftir at tað hevði staðið á botni við Antarktis eina tíð.